# ÚTBOÐ

*Reingerð av sambýlinum Reynstún á Argjum*

*Útbjóðingarskriv*

**Juni 2026**

almannaverkið

Almannaverkið bjóðar út reingerðararbeiðið av sámbýlinum Reynstún, á Argjum í Tórshavn.

## STAÐSETING:

Glyvursvegur 30, 160 Argir

## KONTAKTPERSÓNAR:

Janus H. í Funningsstovu, deildarleiðari, Rakstur og innkeyp

Tlf. 29 70 08 t-post: janusf@av.fo

Heidi Henriksen, stovnsleiðari fyri Reynstún

Tlf. 29 74 40 t-post heidihe@av.fo

# 1. INNGANGUR

Almannaverkið vil við hesum geva tilboðsgevarum møguleikan at bjóða uppá reingerð av sambýlinum Reynstún.

Útboðið verður framt sum eitt alment útboð sambært rundskrivi nr. 9000 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum. Tær formligu reglurnar í hesum útboði viðvíkjandi innlating av tilboði, samskifti í millum útbjóðara og tilboðsgevara og aðrar upplýsingar eru at finna í hesum útbjóðingarskrivi.

Endamálið við hesum útboðnum er at gera eina 3-ára fasta avtalu um dagliga og regluliga reingerð av sambýlið við 18 búfólkum.

Hetta útboðið inniheldur fylgjandi stig:

1. Útinnan av tilboði: Tilboðsgevari fyrireikar sítt tilboð við støði í útboðstilfarinum, og tilboð skal vera latið inn innan ásettu tilboðsfreist. Í hesum tíðarskeiði kann tilboðsgevari fáa fleiri upplýsingar við at seta skrivligar spurningar.
2. Meting av tilboðum: Útbjóðari letur upp og metir um, hvørt innkomin tilboð eru í samsvar við form- og minstukrøv. Eftir hetta verða innkomin tilboð mett í samsvar við ásettu tillutanartreytirnar.
3. Tillutan av sáttmála: Útbjóðari tekur avgerð um tillutan av sáttmála og kunnar tilboðsgevarum um avgerðina.

## 2. ÚTBOÐSTILFAR

Útboðstilfarið er sett saman av:

- Útbjóðingarskriv
- Fylgiskjal 1 – Mannagongd og krav um vasking
- Fylgiskjal 2 - Tilboðsskjal
- Fylgiskjal 2 – Rúmtekning

## 3. LÝSING AV UPPGÁVUNI

- Stødd: uml. 1.130 m² netto
- Slag av bygningi: Sambýlið við felagsøkjum, stórkøki, baðirúmum, gongdum, skrivstovuøki o.l.
- Búfólk: 18
- Starvsfólk: í hvørji lon eru 4 til 5 starvsfólk til arbeiðis samstundis

Reingerðin fevnir um:

- Búeindir / kømur
- Stovur
- Køkar
- Baðirúm og ves
- Gongdir
- Starvsfólkaøki
- Sansarúm og goymslurúm

Sí fylgiskjal 1 – Mannagongd krav um vasking fyri nærri lýsing.

Reingerðingsútgerð, sápa, pappír o.a. verður veitt av Almannaverkinum.

Veitarar kunnu seta seg í samband við stovnsleiðara fyri at avtala at síggja stovnin, í sambandi við at greiða tilboð av hondum.

## 4. AVTALUTÍÐ

Avtalan verður galdandi í 3 ár, frá 01.09.2026 til 01.09.2029.

Almannaverkið hevur møguleika at leingja avtaluna í upp til 1 ár afturat, um semja er um tað.

## 5. ARBEIÐSTÍÐ

Krav er um, at reingerðin fer fram 07:00 til 15:00 gerandisdagar. Her er tó galdandi, at reingerð av økjum har borgarar uppihalda seg, helst skal fara fram frá 08:00 til 14:00. Hettar er vegna, at virksemi á stovninum er lægri tí borgarar eru til ymisk tiltøk ella til arbeiðis.

Tað er ikki møguligt at gera reint í vikuskiftum. Einkult undantøk kunnu gerast í samráð við stovnsleiðara.

## 6. VEITINGARTRYGD

Tað er ein grundleggjandi treyt, at veitarin tryggjar høga veitingartrygd. Veitarin skal í tilboðnum lýsa, hvussu fylgjandi krøv verða lokin:

- Veitarin skal hava eina skipan, ið tryggjar avloysarar við sjúku, frítíð o.l.
- Ongar avlýsingar ella manglandi veitingar kunnu góðtakast orsakað av starvsfólkatroti
- Veitarin skal kunna seta onnur starvsfólk inn uttan seinking
- Veitarin skal hava ein ábyrgdarpersón, ið kann setast í samband við í arbeiðstíð

Veitarar kunnu eitt nú vísa á, hvussu nógv starvsfólk veitarin hevur, sum kunnu traðka til um sjúka ella annað er áfatt. Veitarin kann eitt nú vísa á, við at lýsa hvussu arbeiðið verður skipa í feriutíðum.

Um tað eru ivamál, kunnu veitarar seta seg í samband við Almannaverkið fyri nærri lýsing.

Tað er eitt krav, at treytirnar omanfyri verða nøktaðar. Um ikki veitarin er førur fyri at veita høga veitingartrygd, kann Almannaverkið uppsiga avtaluna.

## 7. OPTIÓN – ÁRLIG HØVUÐSREINGERÐ

Útboðið skal innihalda eina optión uppá einstakar reingerðar uppgávur – bæði størri og smærri. Her kann m.a. verða talan um:

- Høvuðsreingerð av øllum ella pørtum av stovninum
- Høvuðsreingerð av kamar og vesi, í.s.v. at fráflýtan og innflytan av nýggjum borgarum
- Høvuðsreingerð av økjum/øki í sambandi við at handverkarar umvæla/broyta

Optiónin skal gevast sum ein serstakur tímaprísur.

Veitari skal upplýsa serstakan tímaprís fyri høvuðsreingerð, sum í fall av at Almannaverkið ynskir, kann seta í verk í samráð við stovnsleiðaran.

Optiónin verður brúkt eftir tørvi og avtalu við veitaran.

## 8. PRÍSIR OG SKIPAN

Tilboð skal innihalda:

- Árligan fastan prís fyri fasta reingerð. Veitarar skulu upplýsa tilboð í viðfesta tilboðsskjal
- Serskilt prís fyri árliga høvuðsreingerð (optión)
- Tímaprís fyri eykaarbeiði
- Lýsing av arbeiðstíðum

Allir prísir skulu vera uttan MVG.

## 9. UPPSØGN

Sáttmálin kann uppsigast av báðum pørtum við í minsta lagi 4 vikurs skrivligari freist til tann 1. í einum mánaði. Uppsøgnin skal altíð verða givin við slíkari freist, at hon fær gildi frá tí fyrsta degnum í einum mánaði, og freistin kann tí í praksis verða longri enn 4 vikur.

## 10. METING AV TILBOÐUM

Tilboð verða mett eftir:

- Prísur vektar 100%
  - Prís fyri fasta árliga reingerð (90 %)
  - Tímaprísur fyri høvuðsreingerð (10 %)

*Viðmerking: Fyri at vekta tímaprísin fyri høvuðsreingerð í tilboðsskjalinum, verður tímaprísurin faldaður við 75. Almannaverkið lovar ikki tilboðsgevara, at hettar er ein eftirfarandi árlig tímanýtsla. Høvuðsreingerð, verður eftir tørvi og ynski frá Almannaverkinum.*

## 11. FREISTIR

- Freist at seta spurningar: [1. juli 2026]
- Freist at lata inn tilboð: [7. juli 2026]
- Væntað avtaluinngongd: [10. juli 2026]